TING-HELLAN

TINGHELLUDEBATTIN

*Bjarni Djurholm, landsstýrismaður*



# Roytta hønan

Kanska er tað frustratión, men samanborið við garterilsið hava sjáldan so mong bíðað so leingi eftir so lítlum, sum eftir politisku avrikunum hjá Torbirni Jacobsen.

Síggi í bløðunum, at Torbjørn Jacobsen aftur er úti við rívuni og speirekur vinnupolitikkin. Ein kundi spurt: Hví taka TJ fyri fult, tá hansara egnu hava boðað frá, at alt álitið á mannin er fokið? Og tó, ákærurnar eiga ikki at standa ósvaraðar. Tí nøkur orð um vinnupolitikin, sum TJ til fyri stuttum hevur verið partur av.

Orðaði vinnupolitikkurin ger skilnað millum alment og privat. Tað almenna skal tryggja støðugar karmar, og vinnan skal taka við teimum avbjóðingum, sum liggja í einum altjóða marknaði, nýggjari tøkni og vitan. Vinnupolitikkurin lívgar ikki vinnuna. Hinvegin verður lagt upp til at geva føroyskum fyri-tøkum krevjandi og størri avbjóðingar í frælsari kapping á opnum marknaðum og sleppa undan einkarrættum, sum geva stirvnar, dýrar og ineffektivar skipanir. Vinnupolitikkurin tekur tí ikki støðu til, hvørjar vinnur, vit skulu hava her í Føroyum. Ta avgerð taka dugandi fólk, vinnan og váðafúsi kapitalurin.

Á summum økjum er føroysk vinnan ikki í javnbjóðis kapping við útlendsku. Men vinnu-politikkurin leggur ikki upp til at gera kappingina javnari við at avmarka útlendsku kappingina.

Vinnupolitikkurin er politikkur tess almenna at stimbra føroyska samfelagið vinnuliga og arbeiðsliga. Hann er ikki politikkurin hjá vinnuni. Skal hann eydnast, krevur tað samfatan og samstarv millum vinnu og politisku skipanina. Tað krevur greiðan skilnað millum alment og privat og virðing fyri leiklutinum hjá hvør øðrum. Tað krevur eisini, at hvørgin partur letur seg fara av kós, tí hin parturin setir stutttíðar mál fram um tey langsiktaðu.

Tí hevur tað síðani kreppuna í nítiárunum verið aðalmálið, at politiski myndugleikin skal skapa karmar. At landsstýrið og løgtingið skal halda seg burtur frá stýring, og at vinnan skal laga seg til broyttu umstøðurnar.

Politikkurin hevur havt breiða undirtøku í og uttan fyri Løgtingið. M.a. hevur vinnan mett vinnupolitikkin sum eitt tilboð og sum eitt slag av sáttmálauppskoti frá politisku skipanini. Eisini hevur politikkurin, við undantaki í avmarkingunum í fiskivinnuni og fyri stuttum í alivinnuni, bygt á somu prinsipp sum í grannalondunum.

## BTÚ tvífaldað

Støðuga framgongdin í vinnuni, har BTÚ er tvífaldað í sama bili, er eisini orsakað av politikk-inum. Men vit eiga at minnast, at vit hava havt góðar náttúru - og marknaðargivnar umstøður. Fiskiskapurin hevur verið góður, fiskaprísirnir høgir, orkuprísirnir sámuligir, rentan søguliga lág, eingin inflatión osfr.

Men tað skulu sterkir herðar at bera góðar tíðir. Lønartrýstið gjørdist ógvusligt. Farnu 6 árini eru lønirnar hækkaðar um 30%. Almennu útreiðslurnar eru 1100 mio kr størri um árið nú enn fyri 5 - 6 árum síðani. Kappingar-førið versnað samsvarandi. Hetta mátti koma aftur um brekku, tá tað fór at reka ímóti.

Og farnu tvey árini hava greiðar ábendingar verið um, at vit eru ávegis lakari tíðum, har búskapargongdin við sól og undanvindi síðani seinnu helvt av nítiárunum fór at venda, og væntast kundi, at nú fór at lota ímóti. So við skurðinum av blokkinum uppá 366 mio kr árliga kravdist politiskur ryggur.

Hetta visti TJ og tjóðveldið fullvæl. Nú var ikki stuttligt meira. Trúttanin um, at teir vóru upprunin til framgongd og bjartskygni, fór at verða avdúkað sum reyp. So nú var annað til ráða at taka. At sleppa sær burtur.

## Steinar hini

Síðani tjóðveldið rýmdi og síðani vóru settir útum, hevur TJ gingið altráður og steinað hini.

Leiklutirin hjá TJ er eisini sjáldsamur, men tað er kanska frustratión, tí samanborið við alt garterilsið hava sjáldan so mong bíðað so leingi eftir so lítlum, sum eftir politisku avrikunum hjá TJ.

Annars er fáum unt at vera borin til so góðar vinnuligar møguleikar sum TJ. Úrslitið man vera so sum so. Óivað hava hini eisini skuldina har.

TJ minnir mest um eina leysa kanón, sum skjýtur á allar ættir. Í seinastuni mest inn í tjóðveldið. Har hevur TJ nú "sett seg uttan-fyri", sum formaðurin kallar tað. So nú er synd í TJ.

Fyri at tekkjast kammeratunum í flokkinum hevur hann nú aftur vent mykjusprænaranum móti politiskum mótstøðumonnum. Soleiðis roynir TJ við halanum millum beinini at tekkjast for-manninum, fyri at vera tikin til náði. Støðan hjá TJ og floks-formanninum minnir tí ikki sørt um søguna um Stalin, tá hann sum leiðari vísti partísoldatum, hvussu farast skuldi við ólýdnum feløgum. Stalin roytti livandi hønu, sum púra skelkað, spill-nakin, ísakøld og fjaðursár aftaná kloyndi seg upp at stivlalegg-inum hjá Stalin. Soleiðis verður støðan hjá TJ 18. des. - upp eftir stivlalegginum hjá formanninum - roytur og fjaðursárur.

Hoyrdi frá kenningi um mann, sum alt sítt vaksna lív í upp-blástum errinskapi metti seg sum keisara av Etiopia. Hugburður, sum endurspeglaði reyp og yvirdrivna fatan av egnum dugnaskapi, umframt markleyst at hava at øðrum. Skemtiligt viðhvørt, men troyttandi sum fráleið. Men sum kenningurin skemtandi orðaði seg - synd í beistinum.

Soleiðis laga viðurskiftini seg frá manni til mann.


NÝTT NÝTT NÝTT






FØROYINGAR:

NÚ VERÐUR KVØLDÚTBERINGIN AV BLØÐUNUM ENN EINAFERÐ VÍÐKAÐ. NÚ BER NEVNILIGA EISINI TIL HJÁ HALDARUM Á SKIPANESI, Í SØLDARFIRÐI, Í LAMBA, Í RUNAVÍK, Á TOFTUM, SKÁLA OG STRONDUM AT FÁA BLAÐIÐ BORIÐ TIL DYRNAR SAMA DAG, SUM TAÐ ER PRENTAÐ.

HARTIL ER HENDAN TÆNASTAN SJÁLVANDI EISINI GALDANDI FYRI HAVNINA, ARGIR, HVÍTANES, HOYVÍK, NORÐRAGØTU, GØTUGJÓGV, SYÐRUGØTU, LEIRVÍK, FUGLAFJØRÐ OG KLAKSVÍK.

TEKNA TEG SUM HALDARA **NÚ.** VIÐ AT GJALDA FYRI NÆSTA ÁRSFJÓRÐING FÆRT TÚ BLAÐIÐ **ÓKEYPIS** RESTINA AV ÁRINUM

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ______________

Bústaður: ______________

Postnr.: ______________

Bygd/býur: ______________

Telefon nr.: ______________

Undirskrift: ______________

**Ókeypis**
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið

64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Sosialurin | ARGJAVEGUR 26 · P.O.BOX 76 · FO-110 TÓRSHAVN · TEL 34 18 00
FAX 34 18 01 · POST@SOSIALURIN.FO · WWW SOSIALURIN.FO

Sosialurin 341800